# Elektrikarar og serviceteknikari til Pf. LM Electric

Søkt verður eftir elektrikarum og einum serviceteknikara, at byrja skjótast gjørligt.

**Høvuðsuppgávur**
Arbeiðið sum **elektrikari** fevnir um allar vanligar elinnleggingar, umframt teldunet, neyðstreymsskipanir og ymiskar eftirlits- og ávaringarskipanir v.m.

Arbeiðið sum **serviceteknikari** umfatar umvæling av hvítvørum, húsarhaldstólum, og uppseting og umvæling av tólum til stórkøkar.

**Førleikakrøv**
Vit hugsa okkum at tú ert elektrikari ella líknandi. Royndir innan hetta økið eru avgjørt ein fyrimunir. Vit leggja dent á góð samstarvsevni, og at tú ert arbeiðssamur og megnar at arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit bjóða**
tær eitt fjølbroytt og áhugavert arbeiði. Pf. LM Electric er í støðugari menning, og við umleið 40 fólkum í starvi, kemur tú at taka tær av alskyns uppgávum og fær harvið gott innlit í nógv viðurskifti.

Sum ein av størstu og elstu elinnleggjarum í Føroyum stendur LM Electric fyri nógvum stórum og minni uppgávum. Hetta setur stór krøv til bæði handverkarar og leiðslu. Vit arbeiða tí støðugt við at hava eitt spennandi og mennandi arbeiðspláss, til gleði fyri allar partar.

Løn í mun til útbúgving og royndir.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Paula Hofgaard á ph@lm.fo

**Umsókn**
saman við upplýsingum um arbeiðsroyndir, útbúgving v.m. skulu vera Pf. LM Electric, Postboks 3100, FO - 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 1. september 2007.



TEAM85

p/f LM Electric  Hoyvíksvegur 53  Postboks 3100  FO-110 Tórshavn  Tel 351220  Fax 351230  e-mail: lm@lm.fo  www.lm.fo

# Verkfrøðingur

## til teknisku deild



**Av tí at virksemi hjá Teknisku deild er økt nógv, søkja vit eftir einum dugnaligum verkfrøðingi.**

**Arbeiðsøkið**
Tínar arbeiðsuppgávur verða m.a. at gera uppskot og kostnaðarmetingar í sambandi við nýgerð og viðlíkahaldi av vegarbeiði, umframt at standa fyri projektering, útbjóðing, eftirliti og byggirokniskapi í sambandi við øll arbeiði, sum kommunan stendur fyri.

Vit kundu hugsað okkum, at tú hevur hóskandi útbúgving, eitt nú kandidatútbúgving sum verkfrøðingur, byggifrøðingur ella líknandi. Tú hevur drúgvar arbeiðsroyndir og royndir innan almenna fyrisiting, ið samanlagt geva neyðuga førleikan at røkja starvið. Tað er ein fyrimunur um tú hevur kunnleika til Microsoft Office telduforritini og Navision Attain. Neyðugt er, at tú hevur koyrikort.

Vit ynskja, at tú ert røkin, gongur undan í at menna tænastustøðið og dugir væl at fara við starvsfeløgum og viðskiftafólki. Tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt, taka avgerðir og dugir væl at málbera teg í skrift og talu.

**Tekniska deild**
Á teknisku deild eru 12 starvsfólk. Deildin heldur til í posthúsbygninginum saman við byggi- og býarskipanardeildini.

Arbeiðsøkið hjá teknisku deild er millum annað viðgerð av byggimálum og útstykkingarloyvum, planlegging og projektering umframt viðlíkahald av øllum kommunalum vegum og teknískum veitingum, ið kommunan hevur ábyrgd av.

Deildin umsitur heilsu- og umhvørvismál, vegir og gøtur við hartilhoyrandi tekniskum veitingum sum kloakkir, vatnveiting og gøtuljós umframt umsiting av viðlíkahaldsarbeiði innan asfalt, ferðslu, reinhald, bussleiðina og TLS-skipanina.

Kommunan stendur fyri nógvum áhugaverdum anleggsarbeiðum og vit sóknast tí eftir einum nýggjum starvsfelaga, ið saman við okkum og ráðgevandi vinnuni kann átaka sær at føra hesar spennandi uppgávur út í verki.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú venda tær til Boða Haraldson, býarverkfrøðing, ella Bjørgfríð Ludvig, miðfyrisitingarstjóra á tlf. 302010.

**Umsókn**
Umsókn saman við viðmælum, avriti av prógvum og c.v., skal vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 31. august 2007. Vinarliga viðmerk »Verkfrøðingur til teknisku deild«.

REPROZ

Tórshavnar kommuna